# Oljudálking á Skálafirðinum

**Mikumorgunin um hálvgum fýra tíðina fekk løgreglan í Eysturoynni fráboðan um, at olja lak frá einum litaviskum skipi, sum liggur í Søldarfirði. Beinanvegin varð farið í gongd við at fáa oljuna burtur**

DÁLKING
*Ingrid og Solby*



*Sperrir vórðu lagdar út á fjørðin, so at oljan ikki slapp heilt inn í Skálabotn*



*Mett verður útfrá tí nøgdini, sum upp var komin um middagsleitið, at einir 20.000 litrar av olju munnu vera farnir út á Skálafjørðin*

**Søldarfjørður:**
Oljulukturin kennist langan veg frá keiini í Søldarfirði, og gangurin frá útgerðini til at taka oljuna uppaftur er nógvur. Nógv fólk er at síggja allastaðni, menn frá sløkkiliðnum, løgregluni og Pauli Einarsson eisini. Ein stórur tangi, sum er mettur at taka umleið 10.000 litrar stendur og tekur ímóti olju og longur norði stendur ein annar eisini.

– Vit vita ikki júst hvussu stórar nøgdir talan er um, men útfrá tí, sum vit hava tikið upp higartil, so meti eg, at tað fara at verða um 20.000 litrar, sigur Sunnleif Højgaard, leiðari á Sløkkiliðsstøðini í Runavík.

Hann sigur, at arbeiðið við at taka oljuna upp hevur gingið væl, og hann væntar, at tann skaðin, sum møguliga stendst av hesi dálking fer at verða so lítil, sum til ber.

– Fyrsta orsøkin til at alt hevur gingið so væl, og at skaðin ikki verður so umfatandi er, at veðrið er so avbera gott. Hann er sunnan í ættini, og tað ger, at oljan ikki fer so langt inn á fjørðin, og somuleiðis heldur hon seg hesumegin. Her eru tríggir sokallaðir lummar, har meginparturin av oljuni liggur, og tað léttir um arbeiðið, greiðir Sunnleif frá.

Brimil kom á Skálafjørðin um níggjutíðina. Tá høvdu menn frá sløkkiliðnum og aðrir lagt sperrir út á fjørðin og harvið fyribyrgt, at oljan fór at fara longur inn, men tað hevur sum sagt ikki verið nakar trupulleiki. Tað er langt síðani seinast, at ein so stór nøgd av olju er farin á sjógv á Skálafirðinum. Ongin visti at siga fyri vissu á kaiini hendan dagin júst hvussu langt síðani tað er. Men tað at fólk ikki minnast, tað man sanniliga vera tekin um, at tað er langt síðani.

Sýslumaðurin í Eysturoynni, Jógvan Ósá, sigur, at soleiðis sum landið liggur í dag, so er ongin revsilóg fyri tílíka dálking, men litaviska reiðaríið kann vænta sær eitt endurgjaldskrav.

– Um tað verður sivilt ella gjøgnum myndugleikarnar, tað er so ikki avgjørt enn, sigur hann.



*Pauli Einarsson, Árni Dam og Kári P. Højgaard tosa um oljudálkingina*

# BILATORGIÐ

Fyrivarni verður tikið fyri villum

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**MERCEDES BENZ 230 TE STATIONCAR 7 PERS.**
Árg juni 1991, Km 117.000. Bilurin er nýsýnaður, eyka felgur við píkadekkum fylgja við. Nýtt útstoyt (komplett), nýggjur akkumulator, nýggjar bremsuskivur framman og nýggir rútavindarar framman. Bilurin er í sera góðum standi. Nýprísur í 1991 kr. 817.000. .
**Søluprísur Kr. 149.000.**
**Nærri upplýsingar fáast við at ringja á tlf. 216135**



**BMW 520I 150 HK 5-GIR**
Árg 1995, Km 101.000. Bilurin hevur t.d. sentrallás, radio/-bandspælara, el-skjótitak og alufelgur. prísuppskot kr.115.000,-. Nærri upplýsingar fáast á teldupostadressu: bmw@besked.com



**CITROEN SAXO 1.4I 5H**
Árg Okt. 2001, Km 11.000. Sær sera væl út. Kr. 112.000 .



**CITROEN XANTIA 1.9TD 5H**
Árg Jan-99, Km 111.000.
Kr. 125.000 .



**TOYOTA YARIS 1.0I 5H**
Árg Jul-00, Km 38.000. Sera væl hildin. Kr. 110.000 .



**SKODA OCTAVIA 1.9TD STC. VAN**
Árg Mars 2000, Km 74.000. v/mvg.
Kr. 115.000 .



**CITROEN ZX 1.4I 5H**
Árg Juli 1995, Km 58.000.
Kr. 49.000 .



**HONDA CIVIC 1.4I 3H**
Árg Mai 1997, Km 74.000.
Kr. 75.000 .



**MITSUBISHI L300 COSMOS 2.5D VAN**
Árg Mai 1995, Km 113.000.
Kr. 76.000 .



**TOYOTA HIACE 2.4D-TURBO AUT.**
Árg Mai 1999, Km 104.000. v/mvg.
Kr. 150.000 .
**Sýnaður 2003**



**CITROEN XSARA 1.9TD STC.**
Árg Nov-98, Km 75.000. Hevur klima anlegg. Kr. 110.000 .



**OPEL ASTRA 2.0TD STC.**
Árg Sept. 1998, Km 154.000. Sera væl hildin. Kr. 115.000 .

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo

Bilar
Nr. 128 • hósdagur • 10. juli 2003 • 77. árg.




*Ronny í Lon, sølumaður hjá Reyni Service, handar her Jákupi Andreas Mohr, hýruvognsførara í Auto, nýggja Toyota Avensis D-4D*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Føroyingar tikið nýggja Avensis til sín

**Hóast nýggi Toyota Avensis er ein størri og dýrari bilur en forgangarin, bleiv hann sera væl móttikin. Mikudagin keypti Jákup Andreas Mohr í Auto ein nýggjan Avensis. Sín fyrsta Toyota keypti hann í 1969**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Ofta tá ein nýggjur bilur kemur á marknaðin, sum er størri og dýrari enn forgangarin, hendir tað, at kundarnir heldur enn at keypa hendan bilin keypa ein minni bil. Frá Toyota umboðnum, Reyni Service í Hoyvík, verður sagt, at nýggi Avensis bleiv sera væl móttikin, bæði av teimum sum høvdu Avensis áðrenn og øðrum. Avensis fær eisini góð ummælir frá motorjournalistum. Í FDM limablaðnum, Motor, stendur t.d. "Den nye generation af Avensis slår alle øvrige modeller fra Toyota, når det drejer sig om den samlede oplevelse af kvalitet, køreegenskaber, plads og komfort". Bil Magasinet royndarkoyrdi bilin saman við fýra øðrum japanarum, teir søgdu t.d. "Avensis er den bedste allrounder i feltet og spiller rollen som den japanske Passat med overbevisende kvalitetfornemmelse og komfort". Tað vísir seg eisini, at í Danmark hevur sølan verið nógv betur, enn roknað varð við. Avensis er t.d fyrsti bilur við airbag til knøini. Bíligasti Avensis, 1,8 Terra, kostar kr. 244.600,-

## Fyrsta Toyota í 1969

Mikudagin keypti Jákup Andreas Mohr koyrilærari og hýruvognsførari í Auto í Havn ein nýggjan Toyota Avensis 2,0 D-4D. Hann keypti sín fyrsta Toyota, ein MK II, í 1969. Jákup Andreas er føddur í Kaldbak í 1940 og hevur búð í Havn síðan 1960. Hann er útbúgvin bilmekanikari og koyrilærari. Eftir at hava koyrt í Auto síðan 1967 bleiv hann partaeigari í støðini í 1971. Hann hevur eisini arbeitt sum koyrilærari við egnum koyriskúla. Fyrst í 60-unum hevði hann fleiri Ford Taunus, sum hann m.a. leigaði út. Annars hevur hann fyri tað mesta koyrt í Toyota bilum síðan tá, hann hevur eisini havt nakrar Fordar. Fyri nøkrum árum síðan gavt hann við skúlakoyringini og koyrir nú hýruvognskoyring burturav.

### Toyota Avensis 2.0 Sol D-4D sedan

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2.0 litur D-4D 4 syl. 116 hk v. beinleiðis diesel innspræning |
| 0-100 km/t | 11,2 sek |
| Bensinnýtsla | 17,2 km/l |
| Dekkstødd | 205/55-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 463,0 cm |
| Breidd | 176,0 cm |
| Hædd | 148,0 cm |
| Eginvekt | 1375 kg |
| Totalvekt | 1975 kg |
| Prísur | kr. 294.600 |
| Søluumboð | Reyni Service<br>Vegurin Langi<br>FR-188 Hoyvík<br>Tel. 353040<br>www. reyniservice.fo |